**UMHVØRVISMÁLARÁÐIÐ**
Ministry of Environment

Tórshavn, tann 20. desember 2023
J. nr.: 23/25136-2
Viðgjørt: HE
Tygara skriv:
o6.07.09.07.O1.2D13-14

**Javning av upphæddum í arbeiðsskaðatryggingarlógini**

Sambært § 43 í løgtingslóg nr. 67 frá 25 mai 2009 um trygging móti avleiðingum av arbeiðsskaða verða tær í § 42, stk. 6, § 57, stk. 2, og § 59, stk. 1 nevndu upphæddir javnaðar við broytingini í tí til eina og hvørja tíð galdandi høvuðsstáttmála millum Føroya Arbeiðarafelag og Føroya Arbeiðsgevarafelag og avrundaðar til nærmastu 100 kr. Endurgjald, ið verður veitt sum framhaldandi árlig veiting sbrt. § 50, verður javnað á sama hátt.

Upphæddirnar verða javnaðar av landsstýrismanninum eftir tilmæli frá Vanlukkutryggingarráðnum.

Í brævi, dagfest 14. desember 2023, hevur Vanlukkutryggingarráðið mælt til, at nevndu upphæddir verða javnaðar soleiðis:

| | 1/1-2024 (3,34 %) |
|---|---|
| § 42, stk. 6 | kr. 486.600 |
| § 57, stk. 2 | kr. 811.100 |
| § 59, stk. 1 | kr. 198.700 |

Landsstýriskvinnan skal boða frá, at tikið verður undir við tilmælinum, og at tær soleiðis javnaðu upphæddirnar verða almannakunngjørdar sbrt. § 43, stk. 2 í arbeiðsskaðatryggingarlógini, og at endurgjøld sbrt. § 50 verða javnað við sama prosenttali.

Vinarliga

Ingilín D. Strøm
Landsstýrskvinna

/ Pól Egholm

Gongin 7 • FO-100 Tórshavn
Tel. (+298) 35 87 00 • umhvorvi@umhvorvi.fo • www.umhvorvi.fo